# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
TEITUR JOENSEN
TEITUR@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit hava ógvuliga góðar vónir. Nú eru bæði Ingi og Eli við aftur, samstundis sum Áki Olsen er blivin klárur, so hetta skal nokk fara at ganga.*
*Regin Joensen, VÍF*

VÍF-Kyndil:

## Sigur er krav hjá VÍF

**Fyri viku síðani vann Kyndil fyrsta finaludystin í Atlantic Airways-kappingini ímóti VÍF, og tí skal VÍF vinna dystin á heimavølli leygardagin, um teir skulu hava ein møguleika at vinna meistaraheitið**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Klassikarin í føroyskum manshondbólti er uttan iva dystirnir ímillum tey bæði mest vinnandi liðini ígjøgnum tíðirnar, Kyndil og VÍF. Hesi bæði liðini eru aftur í ár partur av mansfinaluni, og sjálvt um VÍF vann endaspælið, so er tað Kyndil, sum stendur við bestu kortunum í hondini undan seinna finaludystinum í Vestmanna leygardagin.

Kyndil hevur havt eitt sera gott endaspæl í bestu mansdeildini í hondbólti. Teir hava savnaðu sær 14 av 20 møguligum stigum, og hetta gjørdi, at teir endaðu í finaluni ímóti vestmenningum, sum lá á odda mest sum alla kappingina. Góða spælið hjá Kyndli í endaspælinum helt eisini fram í fyrsta finaludystinum. Her vunnu teir nevniliga tryggan sigur á VÍF í høllini á Hálsi, og tí eru teir bert 60 minuttir frá at vinna meistaraheitið.

### Jokarar við hjá vestmenningum

Ikki kann sigast annað, enn at VÍF-liðið er illa spert undan seinna finaludystinum. Í fyrra dystinum fingu bæði Agnar Joensen og John Zachariassen reytt kort, og tí vera teir ikki við í dystinum í Vestmanna leygardagin.

Eli Müller og Ingi Olsen vóru tó ikki við í dystinum á Hálsi, og teir báðir eru klárir aftur til dystin leygardagin. Tað sama er Áki Olsen, sum mátti út við einum skaða seinasta dyst. Hetta er gott nýtt hjá VÍF, og so er spurningurin, um hesir klárir at venda gongdina frá seinasta dystinum hjá vestmenningum.

Regin Joensen hjá VÍF sigur, at teir hava góðar vónir undan dystinum leygardagin.

- Ja, vit hava ógvuliga góðar vónir. Nú eru bæði Ingi og Eli við aftur, samstundis sum Áki Olsen er blivin klárur, so hetta skal nokk fara at ganga.

- Tað er sjálvandi keðiligt, at bæði Agnar og John ikki eru við, men tað hevur koyrt væl í venjing í vikuni, og vit eru allir ordiliga klárir til dystin ímóti Kyndli leygardagin.

Regin segði eisini, at VÍF helst hevði onkran jokara í hattinum til dystin leygardagin, men hann vildi ikki siga nakað um, hvør hesin var. Men sum skilst, so verður Johnny Joensen heilt vist partur av VÍF-liðnum leygardagin, og tað ljóðar eisini, at Piti Negru á liðnum hjá vestmenningum.



*Sámal Joensen og hinir VÍF-spælararnir mugu vinna dystin ímóti Kyndli leygardagin fyri at halda fast í FM-vónini.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fullmannað kyndilslið

Tað stendur heldur betur til við fólki hjá Kyndli til dystin leygardagin. Einasti spælarin, sum ikki var við seinasta vikuskiftið, var Hjalti Jacobsen, sum var úti við einum skaða. Hjalti hevur tó vant í vikuni, og hann væntar at gerast klárur.

- Eg havi roynt at vant eitt sindur í vikuni, og har sær rættiliga gott út. Eg vænti og vóni at vera klárur til dystin leygardagin.

Hjalti heldur eisini, at uppskriftin er greið hjá Kyndli. Har er bara eitt at gera leygardagin.

- Eingin ivi skal vera um, at vit ætla okkum til Vestmanna at vinna dystin leygardagin. Vit halda, at vit hava góðan møguleika at vinna á leygardagin, og tað hevði verið gott at avgjørt alt longu tá, sigur Hjalti at enda.

Stjørnan-VB:

## Stjørnan skal steðga VB á heimavølli

**VB vann fyrsta finaludystin í Sunset-kappingini hjá kvinnum síðsta vikuskiftið, og leygardagin skulu tær til Klaksvíkar at møta Stjørnuni í seinna dystinum. Stjørnan er helst favorittur, men VB hevur víst, at tær kunnu steðgast**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Stjørnan var mest sum einaráðandi í endaspælinum í bestu kvinnudeildini í hondbólti í ár. Tær vunnu allar sínar dystir, og tí vóru tær stórfavorittar at vinna meistaraheitið, tá liðini fóru undir hálvfinalurnar og finaluna.

Í fyrsta finaludystinum fingu tær tó ein ordans hvøkk, tá tær vitjaðu hjá VB í Vági. Her vann VB ein tryggan sigur. Sjálvt um sigurin bert bleiv fýra mál, so førdu tær við átta málum, tá fimm minuttir vóru eftir, so sigurin var ongantíð í vanda.

Nú stendur seinni finaludysturin á skránni í Klaksvík, og so er spurningurin, um vágskvinnur eisini megna at geva Stjørnuni ein hvøkk í KÍ-høllini.

### Stjørnan gott heimalið

VB hevur eitt sera gott heimalið, og tær hava eisini havt sera gott tak á Stjørnuni í Vági í ár. Í grundspælinum vann VB tryggan sigur á Stjørnuni, og í endaspælinum taptu tær bert við einum máli í einum dysti, sum kundi farið báðar vegir. Í fyrsta finaludystinum vann VB aftur á Stjørnuni, og hetta vísir, at VB kann steðga Stjørnuni.

Stjørnan er tó eisini eitt sera gott heimalið. Í grundspælinum vunnu tær við átta málum á VB í Klaksvík, meðan dysturin í endaspælinum endaði við einum sjey mála sigri til Stjørnuna. Enn vita vit sjálvandi ikki, hvussu verður við seinna finaludystinum, men ikki er óhugsandi, at Stjørnan fer at vinna henda. Tær hava nevniliga vunnið allar átta dystirnar í Klaksvík hetta kappingarárið. Málmunurin í hesum átta dystunum er pluss 77, so tær hava vunnið við næstan 10 málum hvønn dyst!

Skuldi tað hent, at Stjørnan vinnur dystin á VB leygardagin, so verður ein triði og avgerandi dystur sunnudagin. Hesin skal so eisini spælast í KÍ-høllini í Klaksvík, tí at Stjørnan gjørdist vinnari av endaspælinum, og hetta gevur teimum rætt til tveir heimadystir í finaluni.



*Rannvá Johannesen og VB góvu Stjørnuni ein ordans hvøkk seinasta sunnudag, tá tær vunnu trygt í fyrsta finaludystinum. Nú er spurningurin, um tær megna at steðga Stjørnuni enn einaferð.*